# Andesfjøllini



asta gjógvin í heiminum, tvær ferðir so stór sum Grand
Canyon í USA. Har er eisini heimið hjá »Land Of The Moon«, ein tríggir tímar gongutúrur á sandi og gróti beint upp á ein fjallatind, har alt líkist mánanum og har flúgva Condor fuglarnir 10 metrar yvir tær. HEILT ÓTRÚLIGT. So gott sum eingi ferðafólk koma hagar, tí tað tekur 12 tímar við bussi og koyrt verður á teimum ringastu grótvegunum man kann ímynda sær, sigur Eyðun Thomsen. Machu Picchu, gjøgnum fleiri hundrað ár fjaldi fjallabýurin í hjartanum á tí gamla Inkaríkinum, var eisini eitt upplivilsi fyri lívið hjá unga føroyinginum.

Eitt vóru so mongu upplivilsini undan sjálvanri ferðini. Men tað var ikki bara sum at siga tað at sleppa avstað. Tí nú vísti tað seg, at Honda heilt einfalt var lopið frá sáttmálanum um tey 62 tuktuk prutlini. Fyrireikararnir máttu so finna 62 tuktuks og gera nýtt pappírarbeiði upp á fýra dagar, og hetta megnaðu teir at finna djúpt inni í Amazon frumskóginI. Og tá kappingin skuldi byrja, vóru allar tuktuks klárar, men pappírsarbeiðið og nummarpláturnar vórðu seinkaðar, so dag um dag vóru intensivir fundir og frustreraðir adventuristar, sigur Eyðun Thomsen.

Stórur partur av pappírsarbeiðinum skuldi prógva, at tuktukkirnar ikki vóru stolnar og at tað lættliga skuldi sleppast um landamørk.

Men endiliga var alt fingið upp á pláss og ævintýrferðin kundi byrja.

## Prísurin hækkaði

Fyrstu tríggjar-fýra dagarnar varð koyrt mest sum í ongamannalandi. Einki signal til fartelefonina nakrastaðni og nærum ongar bygdir. Bara bóndir og bøur.

Fyrstu dagarnar koyrdu Eyðun og hollendski makkarin í einari konvoy við seks tuktukkum, men tíðin og vegirnir fóru illa við prutlunum, og skjótt máttu teir siga farvæl til ta einu, sum endaði á verkstaðI.

Sovið varð í tjaldi um næturnar, men ta einu náttina var sovorðið illveður, at teir endaðu á einum hostel.

– Allur streymurin var farin i hesum býnum, Huanta, men vit fingu ein bilskúr at tveita allar tuktuks inn í, so tað var perfekt, sigur Eyðun.

Veðrið hesa ársins tíðina er ógvuliga skiftandi. Tað kann vera sól og summar ta einu løtuna og tropiskur stormur løtu seinni, so tú noyðist at leita tær le.

Morgunin eftir hesa ódnarnátt, fór tuktukkin hjá teimum báðum í verkfall. Hon vildi bert í fyrsta gear, og tað var ein trupulleiki, sum eingin teirra megnaði at fáa greiði á.

– Vit sluppu so uppí ein lastbil, sum skuldi koyra okkum til næsta bý, har vit fingu ókeypis hjálp frá fyritøkuni, sum eigur tuktuk prutlini, sigur Eyðun víðari.

Men ikki gongur altíð sum prestur prædikar. Teir høvdu bert koyrt eina løtu, tá lastbilførarin broytti avtalaða prísin frá 70 soles til 700 soles.

– Vit søgdu bums nei og máttu so taka tuktukkin avaftur lastbilinum. Har stóðu vit so strandaðir. Koyrdu so fýra kilometrar í fyrsta geari, til vit komu til ein lokalan mekanikara í bygdini Uripa. Tað var ein 21 ára gamal drongur, sum hevði lært seg sjálvan við at lesa bil- og lastbilsmanualir. Hann rippaði allan motorin sundur og buldraðist frá klokkan 11:00 til 20:00, tá virkaði endiliga aftur. Men nú var ov myrkt at koyra, so vit máttu yvirnátta har, sigur Eyðun.

Men teir høvdu latið hinum sítt tjald, so teir máttu sova sum frægast. Helvtin av Eyðuni inni í tuktukkinum og Joey undir honum.

## Einki samband

Tíðliga morgunin eftir fóru teir so aftur til stroks niðan brekkuna, men teir vóru ikki komnir meiri enn einar 40 kilometrar, so var sami trupulleikin har aftur. Og nú var hann enn verri, tí nú lak tuktukkin olju sum ein sold.

Aftur vóru teir strandaðir, hesaferð í ongamannalandi, men lukkutíð kom ein lastbilur fullur av korni framvið og tók teir við til næsta bý. Har var tó eingin mekanikari, so teir máttu bíða, til teir aftur fingu eitt lift til býin Cusco.

– Aftur varð allur motorurin rippaður sundur sum hann var. Teir seta so saman aftur sum tað skal og leggja so leiðina móti Puno, Lake Titicaca og markinum til Bolivia.

Men teir eru kortini ikki teir einastu, ið hava trupulleikar at stríðast við. Tvær gentur rendu ein av fyrstu døgunum teirra tuktuk í eitt hol í vegnum. Prutlið bóltaði tvær ferðir runt og fleyg út av vegnum einar hundrað metrar beint niður í eina á. Tíbetur vóru genturnar dotnar úr áðrenn, og tær høvdu tað gott eftir óhappið.

Teir báðir fingu so sínar makkarar aftur og fylgdust síðani inn í Bolivia.

Eftir at teir komu inn í landið, høvdu teir einki samband á fartelefonini og sluppu heldur ikki fram at nøkrum interneti í fleiri dagar, so tað var ikki sørt, at familjan heima í Føroyum var eitt sindur bangin um Eyðun.

Teir komu til bolivianska høvuðsstaðin La Paz 10. november og máttu aftur finna ein mekanikara. Tað vóru fimm tuktuks, sum fylgdust, og tað var í heilum, at okkurt var galið við onkrum teirra.

Hetta var tó skjótt umvælt, og síðani varð leiðin sett móti Salar De Uyuni – The Salt Plains – ið er heimsins størsta saltoyðimørk.

*Framhald á næstu síðu*



*Oyði men vakurt. Eyðun og Joey á veg móti Bolivia*



*Eyðun tjekkar súkluna*



*Á brøttu fjallavegunum í Peru*



*Ofta var lendið óhøgligt*